UTTAN ÚR HEIMI

## Miðsavnar valdið

Danska Fólkatingið fer fyrsta dagin undir at viðgera fleiri lógaruppskot, sum skulu setast í verk, nú avgjørt er at broyta kommunuskipanina og skipanina við amtum. Broytingarnar hava við sær, at kommunurnar verða nógv færri í tali, og at amtini verða avtikin.

Fleiri serfrøðingar ávara um, at lógaruppskotini hjá stjórnini fara at flyta nógv av tí kommunala valdinum til Keypmannahavnar. Teir vísa á, at sambært uppskotunum fær innanríkisráðharrin heimild til at stýra kommunupolitikkinum við kunngerðum, uttan at honum nýtist at spyrja Fólkatingið. Í uppskotunum eru nevnd 204 viðurskifti, har ráðharrin fær hesa heimildina.

Formaðurin í kommunufelagnum, Ejgil W. Rasmussen, er heldur ikki serliga fegin um, at ov nógvar hemildir enda í Keypmannahavn. Hann sigur við Politiken, at uppskotini hjá stjórnini eru ein fjald roynd at sleppa at stýra politikkinum í teimum einstøku kommununum.

## Illir bøndur

Seinastu dagarnar hava harðir samanbrestir verið ímillum misnøgdar bøndur og løgregluna í suðuramerikanska landinum Paraguay. Eitt fólk hevur latið lív, umleið 20 hava fingið skaða, og umleið 300 eru sett í varðhald.

Bóndafelagið í Paraguay krevur, at tað almenna skal lata teimum fátæku bøndrunum meiri jørð. Stjórnin hevur sagt, at hon ætlar at lata bøndrunum 20.000 hektarar afturat, men tað eru bøndurnir als ikki nøgdir við. Teir krevja, at stjórnin skal lata teimum minst 150.000 hektarar afturat, men stjórnin sigur seg ikki hava pengar til at keypa so nógva jørð til bøndurnar.

Tað er sera ymiskt, hvussu nógva jørð bøndurnir í Paraguay hava, og jarðarbýtið hevur verið ein stríðsspurningur í mong ár. Nicanor Duarte, sum tók við sum forsætisráðharri fyri einum góðum ári síðani, lovaði undir valstríðnum tá, at hann fór at útvega teimum fátæku bøndrunum meiri jørð. Nú krevja bøndurnir, at hann heldur orð, skrivar Reuters.

## Stríð um løn

Eitt stríð um løn kann enda við, at stjórnin í Letlandi fer at kæra Svøríki fyri dómstólinum hjá ES.

Málið snýr seg um handverkarar úr Letlandi, sum eru farnir til Svøríkis at arbeiða fyri letlendskar fyritøkur. Eitt nú hevur ein letlendsk fyritøka fingið arbeiðið at byggja ein skúla norðan fyri Stockholm, og hon hevur fingið sær letlendskar handverkarar at byggja skúlan. Svensku fakfeløgini krevja, at teir letlendsku handverkararnir skulu arbeiða fyri somu løn sum teirra svensku starvsfelagar, men tað vil letlendska byggifelagið ikki góðtaka.

Sambært Aftonbladet fáa teir letlendsku handverkararnir 14.000 svenskar krónur um mánaðin umframt frían bústað og mat, men svensku handverkarafeløgini krevja, at teir skulu fáa minst 10.000 svenskar krónur afturat um mánaðin. Svenska stjórnin hevur boðað frá, at hon tekur undir við lønarkravinum hjá fakfeløgunum, og tað hevur fingið øði í letlendsku stjórnina. Hon hóttir nú við at fara til ES-dómstólin við málinum.

## Oyðsl

Í USA heldur republikanski senatorurin John McCain, at Kongressin brúkar alt ov nógvar pengar. Í síðstu viku segði hann, at tað seinasta fíggjarlógaruppskotið er eitt tað størsta oyðslið í nýggjari tíð.

Millum annað heldur senatorurin tað vera púra burturvið, at skattgjaldararnir skulu gjalda eina millión dollarar til ymisk tiltøk, sum skulu haldast næsta ár í sambandi við, at 100 ár eru liðin, síðani Noreg varð loyst frá Svøríki. Sambært blaðnum Seattle Times hevur John McCain einki ímóti norðmonnum, men orð hansara vóru heldur ein roynd at vísa, at tað er einki mark fyri, hvat almennir pengar verða brúktir til.

Seattle Times veit eisini at siga, at norðmonnum í USA nýtist ikki at kenna seg illa av tí, sum McCain sigur, tí sambært blaðnum visti norski felagsskapurin í USA als ikki, at hann skuldi fáa stuðul til tiltøkini næsta ár. Felagsskapurin hevur ikki søkt um stuðul, skrivar blaðið.



*Muslimarnir í Danmark vilja hava at vita, hvussu nógv talifrælsið kann tambast. Tað skulu dómstólarnir nú siga*

*Mynd: Reuters*

# Vilja hava staðfest hvussu langt talifrælsið røkkur

**Í Danmark umhugsar tað Islamska Trúarsamfelagið at leggja sak ímóti teimum báðum sjónvørpunum DR og TV2, tí tey hava víst ein umstríddan film, sum niðurlendingurin Theo van Gogh gjørdi. Van Gogh varð myrdur herfyri**

Muslimskir felagsskapir í Danmark ætla sær nú at fáa dómsvaldið at taka støðu til, hvussu langt talifrælsið røkkur. Teir vilja vera við, at tann islamska trúgvin verður háðað í Danmark, sjálvt um donsk lóg bannar tí, og at hetta er serliga komið til sjóndar, síðani niðurlendski filmsmaðurin Theo van Gogh varð myrdur herfyri.

Tí hevur Islamska Trúarsamfelagið nú biðið sakførara sín kanna, um tað ber til at draga Danmarks Radio og TV2 fyri rættin, tí tær báðar sjónvarpsstøðirnar hava víst filmin "Submission", sum van Gogh hevur gjørt. Filmurin snýr seg um korini hjá giftum muslimskum kvinnum, og lýsingin í filminum er, at kvinnurnar verða kúgaðar, innistongdar og neyðtiknar.

- Vit kanna, um tað ber til at stevna teimum báðum sjónvarpsstøðunum, men endamálið er eisini at mótmæla, at okkara forsætisráðharri hevur heiðrað tann, sum skrivaði handritið til filmin hjá van Gogh. Á tann hátt hevur hann sagt, at tað er í lagi háða muslimar, sigur formaðurin í politisku nevndini hjá Muslimska Trúarsamfelagnum, Kassem Sid, við Politiken.

Við at leggja málið fyri rættin ætlar trúarsamfelagið at vísa muslimum, at hetta er managongdin, um so er, at teir kenna seg háðaðar í einum av vesturlondunum. Sjálvur sigur Kassem Sid, at morðið á Theo van Gogh var ein beistagerð og ein tann ringasta av sínum slagi síðani seinna heimsbardaga.

- Okkara boðskapur er, at tað ber til at fara í rættin í málum sum hesum, og at vit góðtaka ikki harðskap ella sjálvtekt í Vesturheiminum. Tað skulu vit virða, og kann ein muslimur ikki liva við tí, eigur hann at flyta til eitt annað land at búgva, sigur Kassem Sid.

### Rætt at finna markið

Jørn Vestergaard, sum er lektari í revsirætti á lærda háskúlanum í Keypmannahavn, sigur við Politiken, at hann skilir væl, at muslimarnir vilja hava staðfest, hvussu langt danska talifrælsið røkkur.

- Frá forsætisráðharranum og ráðharranum í innflytaramálum hava vit hoyrt ymiskt, sum kann benda á, at talifrælsið hevur einki mark, tá tað snýr seg um fremmandafólk, eisini sjálvt um farið verður langt út um ásetingarnar í revsilógini. Tað ger fólk ótrygg, sigur Jørn Vestergaard. Sjálvur ivast hann ikki í, at fleiri orð í filminum hjá van Gogh eru greitt í stríð við danska lóggávu, vórðu tey søgd í Danmark. Hann heldur, at muslimarnir gera púra rætt í at fáa dómsvaldið at taka støðu til, hvussu langt talifrælsið røkkur.

- Eg havi fult álit á, at dómstólarnir og Hægstirættur kunnu taka eina rætta avgerð í einum tílíkum máli. Talifrælsið kann tambast nógv, men verður ein ávísur partur av fólkinum samanborin við djór og sagdur at vera minni verdur ella enntá ómenniskjaligur, so er tað at fara yvir um mark, sigur Jørn Vestergaard.

### Sum jødarnir

Sambært imaminum ella prestinum Fatih Alev hava teir muslimsku felagsskapirnir í Damark valt at ganga somu leið sum jødarnir í Evropa, tí teir eru vanliga ógvuliga skjótir at venda sær til dómsvaldið, kenna teir seg háðaðar vegna sína trúgv.

- Vit vilja ikki hava serlógir fyri átrúnaðir. Lógirnar eru í lagi, men vit eiga at brúka tær meiri, enn vit gera, sigur presturin, sum vísir á, at tað ber ikki til at kalla allar muslimar í Danmark innflytarar. Nógvir teirra eru eftirkomarar hjá fólki, sum hava búð her í mong ár, sigur Fatih Alev við Politiken.